## Skipan av double kappingarárið 2019/2020

Double-kappingarnar vera 4 í tali og allar verða leygardag kl 15.

Tilmelding fer fram á heimasíðuni dartfo.com inntil hóskvøld kl 22.

Kappingarnar verða skipaðar sum bólkaspæl, har eitt ávíst tal av pørum síðan fer víðari í cup. Við 13-24 pørum verður spælt í 4 bólkum og cup16. Við 25 pørum ella fleiri verður spælt í 8 bólkum og cup32.

Ávíkavist 4 ella 8 pør verða seedað eftir styrkilistanum (fyrstu kapping verður seedað eftir endaliga styrkilistanum fyri 2018/2019).

Spælt verður best av 5 settum í bólkunum

Cup-dystirnir verða best av 7 settum, tó semifinala best av 9 settum og finala best av 11 settum.

## Stig til rankinglista:

Stig verða givin til hvørt **parið** soleiðis:

Par nr. 1 fær 11 stig

Par nr. 2 fær 8 stig

Par nr. 3-4 fáa 5 stig

Par nr. 5-8 fáa 3 stig

Par nr. 9-16 fáa 1 stig

## Fyriskipan av kappingum:

Í hølinum skulu verða minst 8 skivur at spæla á.

Telda og printari skulu vera til taks (netsamband er ikki neyðugt).

Ein persónur **skal** hava heiti sum kappingarleiðari. Hann skipar kappingarnar eftir tí telduforriti, sum hann fær útleverað frá DSF.

Kappingarleiðarin ásetur skrivarar til allar dystir. Spælari kann eisini verða settur at skriva dyst í umfarinum eftir at hann er útsligin.

<u>Víst verður annars til rundskriv um myndugleika hjá kappingarleiðara og atburð hjá leikarum.</u>

**Luttøkugjøld:**

Tað kostar 200 kr. fyri hvørt parið pr. kapping (100 kr í árligum licensi er eisini galdandi fyri double)

Feløgini gjalda 30% av luttøkugjaldinum til DSF.

**Kappingardagar:**

19. okt. 2019 KDF

23. nov. 2019 Team Sandoy

25. jan. 2020 KDF

07. mar. 2020 KDF

**FM-endaspælið 16.05.2020**

FM-endaspælið verður í Mentanarhúsinum í Fuglafirði 16. mai 2020.

FM í double verður avgjørt millum 8 tey bestu pørini á styrkilistanum fyri double (um avboð verða, sleppur næsta parið á listanum við).

Eru pør jøvn í stigum eftir 4 kappingar, verður hugt eftir, hvør hevur flest 1.-pláss, flest 2.-pláss o.s.fr.

Fyrst verða fjórðingsfinalur, best av 7 settum (1 møtir 8, 2 møtir 7 osfr.)

Síðan verða hálvfinalur, best av 9 settum

At enda verður finala, best av 11 settum.